TVØROYRAR KOMMUNA



# **Leiðari** til ungdómshúsið á Tvøroyri

Tvøroyrar kommuna ætlar í næstum at lata upp ungdómshús í pakkhúsi nr. 3 í tí søguliga bygninginum á kaiini á Tvøroyri. Í hesum sambandi verður søkt eftir leiðara til húsið, at byrja 1. mars 2008.

Talan er um eitt starv upp á 30 t./v. Arbeiðstíðirnar verða í høvuðsheitinum seinnapartar og um kvøldið. Húsið verður opið 3 gerandisdagar um vikuna, harafturat má roknast við at tiltøk av og á verða í vikuskiftinum. Afturat leiðaranum verður sett 1 hjálparfólk.

Dagarnar verða býttir sundir soleiðis, at børn fra 4.- 7. flokki verða tann fyrra partin av degnum eftir skúlatíð, og børn/ung frá 8. flokki og upp til 18 ár verða tann seinna partin.

Leiðarin skal í samráð við kommununa og tey ungu sjálv/ur skipa og leggja virksemið í ungdómshúsinum til rættis.

**Leiðarin má tí:**

- Vera nýhugsandi og megna fjølbroyttum avbjóðingum.
- Vera ein eldsál og hava áhuga fyri at arbeiða við børnum og ungum.
- Megna at samskifta við allar aldursbólkar og skipa fyri tiltøkum, ið eru hóskandi fyri øll.
- Kunna arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir.
- Hava hug og áræði at skapa ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka.
- Síggja møguleikar heldur enn vansar.
- Hava evni og áræði at ganga nýggjar leiðir.
- Duga væl at samskifta bæði innan- og uttanveggja.
- Hava teldukunnleika á brúkarastøði,
- helst meira.

**Kommunan bjóðar:**

- Eitt áhugavert starv í einum spennandi og søguligum nærumhvørvi.
- Eitt spennandi og fjølbroytt arbeiði við nógvum avbjóðingum.
- Møguleika fyri sjálvstøðugari støðutakan innanfyri avtalaðar karmar.
- Møguleika fyri eftirútbúgving innan leiðslu o.a..
- Løn sambært avtalu við avvarandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til: Tvøroyrar Kommunu Tvørarv. 37, 800 Tvøroyri. Mrk. Leiðari til ungdómshús, og skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 8. feb. 2008 kl. 12.00.

Um ivamál eller spurningar eru vinaligast setið tykkum í samband við Susanne Madsen ella Jónleyg B. Petersen á tlf. 371085, ella susanne@tvoroyri.fo, jonleyg@tvoroyri.fo.

# SERNÁMSDEPILIN

## Sernámsdepilin og Økispsykiatriin skipa fyri skeiði í Læraraskúlahøllini 5. og 6. mars 2008 um

# ADHD/DAMP v/Christopher Gillberg, professara

Mikudagin og hósdagin, 5. og 6. mars kl. 9 til 16 skipar Sernámsdepilin saman við Økispsykiatriini fyri skeiðinum ADHD /DAMP hjá børnum og ungum.

Tá fer Christopher Gillberg, barna- og ungdómspsykiatari og heimskendur granskari við Universitetssjúkrahúsið í Gøtuborg, at hava skeið, sum er ætlað lærarum, pedagogum, heilsurøktarfrøðingum, læknum, sálarfrøðingum og øðrum, sum hava við børn og ung at gera.

Tilmelding kann fara fram við at ringja til Sernámsdepilin tlf. nr. 314522 (Eleina Mikkelsen, skrivari)

Endalig tilmelding er, tá skeiðsgjaldið á 1.200 kr. er flutt á giro nr. 61891.

Seinasta freist at melda til er fríggjadagin 22. februar 2008.

Íroknað skeiðsgjald er kaffi, te og middagsverður.

Um avboð verður givið eftir 27. februar, verður skeiðsgjaldið ikki afturgoldið.

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 · Postrúm 2036
FO 165 Argir · Tlf. 314522 · Fax 310196
e-postur: sernamsdepilin@snd.fo




# Dátueftirlitið skipar fyri almennum fundi í Miðlahúsinum mikudagin 6. februar kl. 19.00

**Bóklingurin sum Dátueftirlitið hevur gjørt um ung og elektroniskar samskiftismiðlar verður almannakungjørdur.**

Eisini vera framløgur, kjak og pallborðsorðaskifti, við m.a. hesum evnum:

Goyma fjarskiftisveitarar innihaldið í sms boðum og teldupostum?
Er tað í lagi at alt fleiri vakmyndatól halda eyga við tær?
Er tað í lagi at onnur senda myndaboð av tær uttan títt samtykki?
Kanst tú fáa óynsktar upplýsingar á netinum um teg sjálvan strikaðar?
Verða børn og ung ofta happaði og útspilt á internetinum ella við sms boðum?

**Eins og blaðstjórin hevur ábyrgdina av sínum blaði, so hevur tú eisini ábyrgdina av tí, sum tú leggur út á internetið ella sendir við fartelefonini.**

**Tú ert ikki anonymur á netinum!!**

**Luttakarar við pallborðið eru:**
Turið Debes Hentze, forkvinna í Dáturáðnum
Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag
Anna S. Dalsgaard, trivnaðarráðgevi
Annlis Bjarkhamar, verkætlanarleiðari fyri www.eg.fo

**Dátueftirlitið**

Postboks 300 • FO-110 Tórshavn • Tel: 309100 • Fax: 309101 • post@datueftirlitid.fo • www.datueftirlitid.fo